# Spurningurin ikki um, m

**Í fjórðu greinini í røðini um íslendskan samtíðarpolitikk hitta vit Hjálmar Árnason altingsmann fyri Framsóknarflokkurinn, ið er elsti flokkur í Íslandi, stovnaður í 1916. Flokkurin hevur frá byrjan havt tætt tilknýti til landbúnaðin og íslendsku samvinnurørsluna og tískil eisini havt bestu undirtøkuna á landsbygdini. Síðani 1995 hevur flokkurin verið í stjórnarsamgongu við Sjálfstæðisflokkinn og átti forsætisráðharran eitt skifti í farandi valskeiði. Á Altingsvalinum í 2003 fekk flokkurin 17,7 prosent av atkvøðunum, men í flestu veljarakanningum síðani í heyst hevur flokkurin tó staðið til tap, ikki at siga skrædl. Nýggjastu kanningarnar vísa, at flokkurin fer at fáa millum 7 prosent og 10 prosent av atkvøðunum hesa ferð. Verður hetta úrslitið leygardagin er ivasamt, um Framsóknarflokkurinn heldur fram í stjórnini. Íslendingar skulu á val í morgin**



*Í morgin skulu íslendingar á val*

**POLITIKKUR**



*Carl Jóhan Jensen*
*Reykjavík*

Blaðmaðurin hjá Sosialinum hitti Hjalmar á kaffistovuni í Altingshúsinum ein bísturkaldan fríggjadagsseinnapart. Hjalmar er av føroyskum bergi brotin, abbin Hjalmar Waag var ættaður úr Klaksvík. Sum smádrongur plagdi Hjalmar at vera í Klaksvík og ferðast um summarið hjá abbabeiggjanum Einari Waag eldra. Fyrst í hálvfjersunum búði hann eitt ár í Havn og gekk á Fróðskaparsetrinum. Tíðina í Havn og eisini eftir at hann var heimaftur komin gjørdi hann sendingar fyri útvarpið um Ísland og íslendsk viðurskifti. Sendingarnar úr Íslandi vórðu sendar undir heitinum: Jauararnir.

Hjalmar hevur eisini fingist eitt sindur við at týða føroyskar bókmentir. Seinast í hálvfjersunum týddi hann t.d. Fiskimenn eftir Martin Joensen og las hana upp í íslendska ríkisúrvarpinum.

Val eru javnan einki uttan ein íleiðing hjá teimum, sum sita á tingi, at skoyta fýra ár aftur at tingsetu síni. Kortini hendir tað seg, at tinglimir síggja val sum eitt høvi at gevast í politikki og taka sær okkurt annað fyri. Hjálmar Árnason er ein teirra. Blaðmaðurin legði tí fyri við at spyrja hví hann ikki stillar uppaftur.

Hjálmar Á.: Nú havi eg sitið í tólv ár á tingi. Eg havi altíð arbeitt í tíggjuáraskeiðum, so havi eg skift til okkurt annað. Áðrenn eg kom á ting var eg t.d. rektari í Keflavík. Nú havi eg, sum sagt, sitið á tingi í tólv ár, so nú tími eg ikki longur.

Blaðm.: Nú eru viðurskiftini við Evropa ikki eitt høvuðsmál í valstríðnum hesa ferð, men kortini gongur ES og møguligur íslendskur limaskapur í sum ein undirstreymur í orðaskiftinum?

Hjálmar Á: Jú, tað er sjálvandi okkurt um tað.

Blaðm.: Framsóknarflokkurin sýnist at vera í tvíningum viðvíkjandi limaskapi. Eru líkindi til at fáa eina felagsstøðu til ES-spurningin í Framsóknarflokknum?

Hjálmar Á: Flokkurin setti í síni tíð eina nevnd, sum núverandi floksformaður, Jón Sigurðsson, stóð á odda fyri. Í hesi nevndini vóru eini 150 fólk á øllum aldri, úr øllum stættum og allastaðni av landinum. Summir nevndarlimir vóru ógvuliga eldhugaðir fyri ES-limaskapi, aðrir søgdu tvørt nei og restin býtti seg út á ymisk brigdi av fyrivarni. Men niðurstøðan í hesi nevndini hjá flokkinum var, tá ið samanum kemur, ikki so ólík niðurstøðuni í nevndini, sum Björn Bjarnason, dómsmálaráðharri hevur verið formaður fyri, teirri, sum forsætisráðharrin í 2004 setti at kanna viðurskiftini við ES, hin sonevnda Evropa-nevndin, ið fyri kortum lat álit frá sær. Eg sat sjálvur í teirri nevndini saman við floksfelaga mínum Jóninu Bjartmarz. Nevndin staðfesti tað, sum Halldór Ásgrímsson, fyrrverandi formaður okkara og forsætisráðharri, aftur og aftur hevur víst á: spurningurin er ikki, um Ísland gerst limur í ES, spurningurin er, nær Ísland tekur hetta stigið.

Blaðm.: Hvørjar eru so grundgevingarnar fyri at velja limaskap?

Hjálmar Á: Grundgevingarnar eru, eftir míni áskoðan, tvíbýttar. Í fyrsta lagi eru vit partur av Evropa og ES er og verður okkara størsti marknaður, ikki minst um bretar og danir gera av at skifta gjaldmiðil og fara at brúka evruna. Tá verður meiri enn 70 prosent av okkara útflutningi til lond í evru-økinum. So við atliti til gjaldoyraviðurskifti og til búskapin sum heild, so haldi eg, at tað er best fyri okkum fíggjarliga at hava somu umstøður, sum tey hava í marknaðarlondum okkara. Vit kunnu ikki hava lønir í íslendskum krónum, men selja fyri prísir, sum eru ásettir í evrum.

Blaðm.: Men hava íslendingar ikki gjørt tað alla tíðina, eg meini við, tit hava higartil selt í útlendskum gjaldoyra, annaðhvørt í dollarum, pundum ella evrum, og samstundis havt eina íslendska krónu, uttan at tað sýnist at hava elvt til munaverdar trupuleikar?

Hjálmar Á: Men krónan hevur verið dýr. Dýr og veik.

Blaðm.: Av tí at hon sum er flýtur?

Hjálmar Á: Eisini tað eyðvitað. Men mest er tað hetta, sum eg nevndi, at tað ber illa til at handla við meginmarknaðar okkara í evrum og gjalda lønir o.a. í íslendskum krónum. Og tað fer so slettis ikki at bera til, um danir og bretar skifta til evruna. Ymsar stórfyritøkur á fíggjarmarknaðinum her eru longu farnar at gera upp í evrum.

Blaðm: Tú segði orsøkirnar vera tvíbýttar?

Hjálmar Á: Ja. Hin grundgevingin er, at sum er, noyðast vit sum partur í EBS-sáttmálanum, at lógarfesta hjá okkum ymsar ES-fyriskipanir úr Brússel. Men av tí at vit standa uttanfyri ES, hava vit ongar møguleikar at ávirka hesar fyriskipanir, vit bara taka ímóti, uttan at hava eitt einasta orð at siga.

Blaðm.: Men sambært álitinum hjá Evropa-nevndini, hava íslendskir myndugleikar ikki til fulnar brúkt teir møguleikar, sum teir hava til at ávirka tilgongdina fram ímóti bæði reglugerðum og tilskipanum, ið koma frá ES-nevndini og Ísland fyri sín part noyðist at taka inn í sína lóggávu?

Hjálmar Á.: Tað er rætt, at nevndin m.a. kemur til tað niðurstøðu, at íslendingar kundu lagt meira fyri til at hava ávirkan, eitt nú havt fleiri embætismenn í Brússel, men so leingi vit ikki eru limir í ES, eru vit heldur ikki fullgildigir luttakarar í teirri lóggávutilgongd, sum fer fram har. Kjak hevur javnan tikið seg upp her heima um hesi viðurskiftini. Eitt nú fyri nøkrum árum síðani, tá ið ES-nevndin setti bann fyri at selja fiskimjøl, orsakað av onkrum fjanda, sum hendi niðri í Evropa. Íslendingar fingu onga atkomu at viðgerðini av tí málinum yvirhøvur.

Blaðm.: Men tekur ES-nevndin ikki einsamøll slíkar avgerðir. Hon skal jú, eftir ásetingunum hjá ES taka avgerðir viðvíkjandi innara marknaðinum óheft av stjórnunum í limalondunum, seta reglur og geva fyriskipanir?

Hjálmar Á: Limalondini hava møguleika at koma inn og siga sína áskoðan, tá ið ES-nevndin skal taka avgerð um eitthvørt. Vit vilja hava hetta soleiðis ella soleiðis. Sum sagt royndu vit, tá ið málið um fiskimjølið tók seg upp, at fáa atkomu at viðgerðini í ES-nevndini, tí fiskimjølsútflutningurin hevur stóran týdning fyri Ísland búskaparliga. Men har komu vit til stongdar dyr. Har var einki at gera og hví? Tí vit eru ikki limir.

Blaðm.: Men í álitinum er eisini tikið fram, at mangan eru embætismenn hjá ES illa ella als ikki kunnaðir um rættindini hjá EBS-londunum, eitt nú í sambandi við slík mál sum hatta, ið tú nevnir, hinvegin hevur tað gingið eitt sindur slakt hjá EBS-londini at gera vart við síni rættindi.

Hjálmar Á.: Sjálvandi kunnu vit leggja meiri á okkum, hava fleiri embætismenn o.s.frv., men tað er dýrt, ótrúliga dýrt. Og tað broytir heldur ikki tað sannroynd, at íslendingar langt burturfrá hava fingið so greiða atgongd til ES-nevndina, sum viðurskifti okkara krevja. Vit hava at kalla onga ávirkan á tað embætismannaviðgerð, sum fer fram í málum, sum eru átrokandi fyri okkum, av tí at vit ikki eru fullgildigir limir. Og hvat merkir so tað? Ja, tað merkir, at vit upp á ein máta hava latið sjálvræði frá okkum til Brússel, uttan at fáa nakran rætt afturímóti. Og hetta við sjálvræðinum er helst eisini ein megingrund til, at nógvir av teimum eldru veljarunum eru so harðliga ímóti ES. Teirra ættarlið hevur lyndið til at síggja 17. juni 1944 í einum ógvuliga romantiskum ljósi. Tá